## Endurnýggja kvinnusangir

Grønlendsku songkvinnurnar Julie Berthelsen, Nina Kreutzmann Jørgensen og Kimmernaq leggja nú seinastu hond á eina fløgu við nýggjum útgávum av gomlum grønlendskum kvinnusangum, skrivar blaðið AG. Talan er um sangir frá 1920'unum og 1930'unum. Hugskotið um floguna kom fram, tá kvinnufelagssamskipanin í Grønlandi helt sín 50 ára dag, og síðani hevur verið arbeitt við tí. Enn er ógreitt, nær fløgan kemur í handlarnar, men helst verður tað beint eftir páskir.



## Ætlar at byggja nýtt Titanic

Finski stórhandilsmaðurin Toivo Sukari umhugsar at byggja eitt modell av tí kenda ferðamannaskipinum Titanic, sum sakk í Atlantshavinum í 1912. Tað nýggja Titanic fer ikki at søkka, tí skipið skal standa uppi á landi og brúkast sum gistingarhús og matstova. Skipið verður 269 metrar langt og 28 metrar breitt og sostatt líka stórt sum tað upprunaliga Titanic. Toivo Sukari eigur eina handilsketu, sum selir ymsan húsbúna, og harumframt hevur hann tvær matstovur og ætlar at byggja fleiri, skrivar finska tíðindastovan FNB.




# Twitter er úrlatna Facebook

**TWITTER**

**Í Ensk-Føroysku orðabókini frá Sprotanum finna vit orðið twitter.**
1. **Láta**
2. **Gnísta, sussa**
3. **Fjáltra, vera fjálturstungin, vera ráðaleysur; nøtra, piprast**

**Twitter kappast við Facebook, men einasti munurin er, at Twitter loyvir bara tíni støðu. Tú sleppur heldur ikki at skriva meira enn 140 tekn**

INTERNET
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í innganginum til henda tekst eru júst 140 tekin, sum er markið fyri, hvussu nógv tú sleppur at skriva í tína støðu ella status á Twitter, ið er einasta funktiónin hjá sosiala netverkinum, sum vinnur alsamt størri frama á netinum.

Tað hevur við sær, at málsligi framburðurin kanska ikki fylgir Hammershaimb, men hetta tryggjar, at tú gert tær ómak at greiða stutt og greitt frá, hvat tú hugsar um ella gert beint nú.

Sambært Poltiken er tað júst hetta, ið ger, at Twitter hevur so stóra undirtøku.

Sambært Lisbeth Klastrup, sum er lektari á IT-Universitetinum í Keypmannahavn, kann orsøkin til, at Twitter vinnur so stóran frama, vera, at tú ikki fært at vita, hvørji spurnabløð fólk hava svarað og hvønn onkur er vorðin vinur við. Tað eru so fáir – men beinraknir – upplýsingar, sum koma, og tí vinnur Twitter frama.

Twitter hevur sítt pláss á netinum, men tað er serliga í samband við fartelefonirnar, at Twitter veruliga kemur til sín rætt.

**www.twitter.com**

**Twitter varð gjørt í 2006 í býnum San Fransisco í USA.**
**Mett verður, at tað eru millum fýra og fimm milliónir brúkarar á heimasíðuni. Mett verður somuleiðis, at Twitter er triðstørsta sosiala netverk á netinum. Bara Myspace og Facebook eru frammanfyri.**

140 tekin er líka langt sum eini smsboð, og tí er bæði skjótt og lætt at greiða frá onkrum á telefonini, sum eftir hetta verður lagt beinleiðis á netið.

### Skjótastu tíðindini

Fleiri dømi eru um, at Twitter hevur verið skjótari við upplýsingum enn vanligu miðlarnar. Hetta hendi til dømis, tá ein ungur maður byrjaði at skjóta í Virginia Tech skúlanum í USA. Tá vóru boðini komin inn á Twitter, áðrenn nakar vanligur miðil var á staðnum.

Eisini tá eitt flogfar datt niður í Hudson River í februarmánaði vóru myndir komnar á Twitpic, sum er ein av undirsíðunum hjá Twitter, áðrenn nakar annar hevði myndir av undrinum, tá flogskiparin bjargaði øllum umborð.

### Størri enn teldubrøv

Sambært kanningum, sum Telegraph.co.uk hevur fingið fólk at gera fyri seg, vísir tað seg, at tá talan er um annað enn arbeiði, so verða sosial netverk sum Twitter og Facebook nýtt meira enn vanligir teldupostar.

- Fyri tveimum árum síðani hevði hetta ikki komið fyri, staðfestir Alex Burmeister frá felagnum, Nielsen Online, sum gjørdi kanningina fyri Telegraph.co.uk

### Fáir føroyingar

Líkt er til, at tað enn ikki eru so nógvir føroyingar á Twitter, men hetta kunnu vit ikki vita við vissu, tí telefyritøkurnar mugu hava eina rættaravgerð fyri at kanna, hvussu nógv vitja eina heimasíðu, og tað, men kenna vit føroyingar rætt, so verður ikki leingi til vit fáa at vita á Twitter, hvat fólk fara at eta nú, hvørji tilboð ein fyritøka hevur og at tað regnar í Vágsbotni.